# Skuldi bara kostað átta milliónir meiri

*– Lærarafelagið hevur ikki rætt í, at tað er ein treyt, at nýggja fólkaskúlalógin kostar 18-20 millóniur meiri, sigur Bjarni Djurholm, lærari og politikari*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tá ið nýggja fólkaskúlalógin varð sett í verk fyri trimum árum síðani, fingu vit at vita, at hon fór bara at kosta átta milliónir meiri enn tann gamla lógin.

Hetta sigur Bjarni Djurholm, politikari og lærari.

Sum politikari var hann formaður í mentamálanevndini, sum í viðgjørdi málið um nýggju fólkaskúlalógina, og nú er hann formaður í fíggjarnevndini.

Sum lærari er hann varastjóri í Eysturskúlanum.

So alt í alt skuldi hann havt so gott innlit sum fáur í tað nýggju fólkaskúlalógina, og hvat, hon ber í sær.

Vit hava spurt hann, hvat heldur um ósemjuna, ið mestsum hevur lagt fólkaskúlan lamnan.

Og Bjarni Djurholm er avgjørt ikki samdur í, at tað er nøkur natúrlóg, at tann nýggja fólkaskúlalógin partú skal kosta 18-20 milliónir meiri, soleiðis, sum ført hevur verið fram.

Hann sigur, at tá ið lógin varð samtykt í 1997, fekk løgtingið at vita frá Landsstýrinum, at tann nýggja lógin fór at kosta einar 8-9 milliónir meiri enn lógin, sum var í gildið.

– Og tað var enntá aftaná tær stóru sparingarnar, sum vóru gjørdar í kreppuárunum.



*Tað hvílur ein tung ábyrgd á landsstýrismonnunum Signari á Brúnni og Karsten Hansen. Tí fyrsta treyt fyri at loysa ósemjuna, er, at teir báðir semjast, sigur BjarniDjurholm*

### Gullrandaður skúli

Bjarni Djurholm sigur, at tað er fyri ein stóran part latið upp í hendurnar á landsstýrismanninum í skúlamálum at gera av, hvussu nógv tann nýggja fólkaskúlalógin skal kosta.

– Gamla fólkaskúlalógin var ein karmur og vórðu allir karmarnir fyltir, kundi hon fyri tað væl havt kostað 50 milliónir meiri, enn hon gjørdi.

– Nýggja fólkaskúlalógin er eisini ein karmur. Men ein aðalmunur á hesari lógini og teirri gomlu, er, at hendan nýggja lógin er í stóran mun stýrd av kunngerðum.

– Hvussu nógv, skúlin skal kosta, veldst tí alt um, hvussu nógvar kunngerðir verða settar í verk.

– Men ikki minst veldst tað um, hvussu umfatandi, ella „gullrandaðar" hesar kunngerðirnar verða.

— Landsstýrismaðurin í skúlamálum hevur tískil heilt og fult tamarhald á, hvussu nógv skúlin skal kosta.

– Tað var eisini endamálið, at tann nýggja lógin skuldi setast í verk í stigum yvir eitt longri áramál.

Bjarni Djurholm sigur, at eftir hesi nýggju lógini ber tað eisini væl til at fáa skúlan at kosta 50 ella 100 milliónir meiri, enn hann ger, tað er bara at seta nógvar, umfatandi kunngerðir í gildi.

Og hann leggur afturat, at tær kunngerðir, sum eru settar í verk, bera ikki á tað borðið, at ætlanin er at ganga í smáum skóm, tí tær hav verið so víttfevndar, sum tað fakliga hevur verið ynskiligt at tær skulu veramen tær taka onki fíggjarligt atlit.

– Og hevur landsstýrismaðurin hildið at skúlin bleiv ov dýrur, hevur hann havt allar møguleikar til at útseta gildiskomuna.

*Men skulu vit ikki hava ein skúla á sama støði sum hini norðurlondini?*

– Tað vildi verið burturvið at sagt nakað annað, men tá ið dentur verður lagdur á tann fíggjarliga partin, hevur landsstýrismaðurin heimild til at avmarka kunngerðirnar, og til at útseta gildiskomuna, uttan at tað nervar undirvísingina, soleiðis, sum hon er nú.

### Signar og Karsten mugu semjast

Bjarni Djurholm sigur, at tað er harmiligt, at ósemjan um viðurskiftini í skúlanum skuldi enda við arbeiðssteðgi.

Fyrsta treytin fyri at loysa hesa ósemjuna, er, at Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og í skúlamálum finna saman og draga somu línu mótvegis lærarunum.

– Í løtuni tosar Signar á Brúnni í eyst um, at nýggja skúlin áleggur lærarum meiri arbeiði og at tað eiga teir samsýning fyri.

– Samstundis tosar karsen Hansen í vest um, at hann vil ikki gjalda.

– Sostatt hevur Lærarafelagið tveir mótpartar. Og undir slíkum umstøðum er tað ómøguligt at loysa ósemjuna.

Bjarni Djurholm sigur, at tað tí er neyðugt at landsstýrismenninir seta seg saman og finna eitt felags stev mótvegis landsstýrinum.

– Tað er neyðugt, at teir finna útav í felag, hvussu nógv skúlin skal kosta.

– Og tá ið teir hava funnið útav tí, skulu teir geva Lærarafelagnum eitt eitt ítøkiligt útspæl, sigur Bjarni Djurholm.

# Nú má løgmaður leggja uppí

*– Støðan sær vónleys út, heldur formaðurin í foreldrafelagnum í Hoyvík*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Nú er tíðin komin, at løgmaður má leggja upp í og fáa ein enda á arbeiðssteðginum í fólkaskúlanum.

Tað heldur Thordur Thorsteinsson, formaður í foreldrafelagnum í Hoyvík.

Hoyvíkar Skúli er so hart raktur sum nakar av arbeiðssteðginum, tí har eru heilir 14 av teimum 24 lærarunum í arbeiðssteðgi.

Foreldrafelagið í Hoyvík er eisini tann foreldrabólkurin, sum hevur gjørt mest vart seg í hesi ósemjuni.

Og nú ætlar felagið at kalla saman til fundar, har ið umboð fyri Lærarafelagið skal greiða teimum frá støðuni og, hví hendan ósemjan tók seg upp.

Thordur Thorsteinsson sigur, at enn er ikki greitt, nær hesin fundurin verður, og um tað ber til at fáa Lærarafelagið at greiða frá støðuni, men hann sigur, at tað verður umhugsað at halda fundin fyri øllum foreldrunum.



*– Nú má løgmaður traðka til og fáa ein enda á ósemjuni í fólkaskúlanum so at børnini sleppa aftur í skúla, heldur formaðurin í foreldrafelagnum í Hoyvík. Samstundis eigur nýggja skúlalógin at verða sett úr gildi í eini tvey, trý ár*

### Løgmaður má leggja upp í

Annars harmast formaðurin í foreldrafelagnum um, at tað tykist ikki, sum um nakar sum helst røringur er í málinum og at allar samráðingar fullkomiliga liggja í dvala.

– Tað tykist sum um málið liggur fullkomiliga stilt.

– Men tað kann ikki ganga í longdini og tí er tað neyðugt, at løgmaður nú traðkar til og átekur sær sína ábyrgd sum ovasti leiðari landsstýrisins.

Thordur Thorsteinssin fýlist serliga á, at Signar Á Brúnni týðiliga hevur boðað frá, at hann fær onki gjørt, hóast lógin áleggur honum ovastu ábyrgdina av fólkaskúlanum.

– Tí er tað neyðugt, at løgmaður nú áleggur landsstýrismanninum í skúlamálum og í fíggjarmálum at bera so í bandi, at samráðingarnar verða tiknar uppaftur.

– Samstundis eigur løgmaður at gera teimum báðum teirra ábyrgd greiða.

– Tí nú tykist tað, sum um fíggjarliga ábyrgdin og undirvísingarliga ábyrgdin nú eru samanvavd, so at ongin finnur útav nøkrum.

Thordur Thosteinsson heldur, at støðan er so ógreið í løtuni, at løgtingið eigur bara at taka nýggju fólkaskúlalógina av fyribils og at seta tað gomlu lógina í gildi í eini tvey, trý ár, inntil landsstýrið hevði gjørt sær púra greitt, hv at ætlanin er við teirri nýggju lógini.

– At leggja alt lamið tænir ongum endamálið, sigur Thordur Thorsteinsson.





*Jørgen Niclasen sigur, at málið um býtið av sildakvotuni fekk aðra vend, enn lagt varð upp til, tá býtt varð*

# Vil hava greiðar linjur

*Býtið av sildakvotuni hevur verið heldur flótandi við ymsum tonsatali ár um ár. Nú hevur landsstýrismaðurin skorið ígjøgnum og álagt eina fasta kvotu, og tað hóvar ikki øllum. Vinnan varð biðin um at hjálpa til við at býta kvotuna, men kom ikki til nakað úrslit, og tí mátti landsstýrismaðurin áseta eitt tonsatal*

EDVARD JOENSEN

Sildakvotan hjá føroysku skipunum hevur verið býtt ymiskt í nøkur ár. Tað bar ikki til, helt Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum vildi hava greiðar linjur at ganga eftir. Nú er skorið ígjøgnum, og Fram II og Pelagos hava fingið tillutað eina kvotu, sum er størri, enn hon var í fjør, men samsvarar við partin, teir høvdu, tá býtt varð fyrstu ferð.

Í viðmerking til málið um søluna av Fram II og Pelagos, sum umrøtt varð í blaðnum i gjár, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, at kvotabýtið fleyt, og hann tí vildi hava fastlagt ein býtislykil.

Í verandi býti hava Fram II og Pelagos hvør fingið tillutað eitt sindur minni enn helvtina av tí, nótaskipini hava fingið í part.

Á fundi, Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevði við vinnuna, bað hann Reiðarafelagið royna semju um kvotabýtið. Men hann fekk tað svar, at vinnan kláraði ikki at koma til eina semju. So hann varð noyddur sjálvur at skera ígjøgnum og leggja eina linju.

Eftir at hetta býtið er gjørt, hava eigararnir av Fram II og Pelagos so selt skipini við fiskiloyvunum til JFK Trol í Klaksvík, sum ætlar at brúka tey til at útvega Nærabergi betri møguleikar at fiska svartkjaft. At JFK Trol so møguliga selur partar av loyvunum víðari, er nakað, sum landsstýrismaðurin ikki fær gjørt so nógv við, sigur hann. Hann hevur bara lógina at halda seg til, sigur Jørgen Niclasen. Og hon forðar ikki slíkum handli.

Hinvegin sigur Jørgen Niclasen, at tá hann hevði fund við gomlu eigararnar av Fram II og Pelagos, var einki, sum bendi á, at málið fór at útviklað seg, sum tað nú hevur gjørt.

Jørgen Niclasen sigur, at eigararnir av Pelagos hava søkt um innflutningsloyvi til eitt nýtt svartkjaftaskip. Men tann umsóknin er enn ikki liðugt viðgjørd í Fiskimálastýrinum. Har er annars bæði tekning og tilsøgn um fígging og tað heila, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

Men nú hava menninir selt skipið, sum hevur fiskiloyvini, so ikki kann væntast, at hendan umsóknin nú verður viðgjørd víðari, skilst á landsstýrismanninum.

Í greinini í gjár varð sagt, at skipini í fjør áttu 1.100 tons hvørt. Her er misskiljing komin í, sum blaðmaðurin skal taka á sín kropp. Heildarkvotan hjá hvørjum skipinum var 1.667 tons av norðhavssild. Av hesum kundu tey 1.100 tonsini fiskast í norskum sjógvi. Umberi misskiljingina.

# Boðan og vitnisburður

*Trúboðin hevur til endamáls at bera Guðs orð um landið. Tað verður gjørt sum reportagur frá tiltøkum, vanligar blaðgreinar ella skrivligir vitnisburðir frá fólki*

EDVARD JOENSEN

Uppgávan er at bera Guðs orð út um landið, samstundis sum sagt verður frá tiltøkum og kirkjuligum arbeiði, sigur Tom Skaale, ábyrgdarblaðstjóri á Trúboðanum.

Í niðastu hædd í norðara enda í Leguhúsinum í Nesvík heldur blaðið Trúboðin til. Blaðrúmið er útgjørt, sum eitthvørt tilsvarandi rúm er í dag við teldum og skannarum. Ein blaðmaður starvast fast á blaðnum. Umframt er samstarv við fólk, sum javnan senda tilfar til blaðið, sigur Tom Skaale.

Trúboðin er eitt áhugablað, sum er málgagn hjá Heimamissiónini. Tó eru tað ikki bara tiltøk hjá sjálvari missiónini, sum viðgjørd verða í blaðnum. Men tað er eingin loyna, at tað er missiónin, sum gevur blaðið út.

Tom Skaale, blaðstjóri, sigur, at tað kemur væl av innsendum tilfari til blaðið. Men tað kemur av og á tilfar, sum ikki verður mett av slíkum slag, at tað verður prentað. Slíkt verður stutt og greitt burturbeint.

Tilfarið, sum kemur í blaðið er mest um missións- og kirkjuligt arbeiði. Tom Skaale sigur, at tey plaga at gera nakað væl burtur úr Ytri Missiónsarbeiði. Til dømis við greinum um og reportagum frá trúboðarum í fremmandum londum. Serliga egnum trúboðarum, men eisini fremmandum, sum hava við missiónina at gera.

Men tað er ikki so, at bara verður sagt frá tí, sum hendir úti í heimi. Sjálvandi verður skrivað um tað, sum hendir heima hjá okkum sjálvum. Sagt verður frá tiltøkum og hendingum, sum fara fram í kirkjuligum og missiónsarbeiði í Føroyum. Tvørkirkjulig tiltøk. Men vanliga ikki um aðrar samkomur ella trúargreinar enn ta, sum stendur aftan fyri blaðið, sigur Tom Skaale, blaðstjóri á Trúboðanum.

Trúboðin kemur út aðruhvørja viku. Eitt fólk arbeiðir fast á blaðnum. Tað hevur skift eitt sindur hesi seinnu árini, og verandi blaðmaðurin, Derhard Olsen, sum hevur verið blaðmaður seinastu tvey árini, fer væntandi í summar undir lestur í Danmark, so tá skal aftur skiftast, sigur Tom Skaale.

Blaðmaðurin ger alt vanligt blaðarbeiði. Hann savnar tilfar, skrivar og setir upp, umframt at hann skal savna lýsingar til blaðið.

Tá blaðið er skrivað og sett, verður tað rættlisið. Tað eru eini fýra fólk, sum plaga at gera tað, sigur Tom Skaale. Hetta eru fólk, sum annars hava tilknýti til missiónina.

Alt hetta arbeiðið verður gjørt í Nesvík, áðrenn blaðið verður prentað á Dimmalætting. Blaðið hevur seinastu tvey árini verið prentað í litum.

Tað er eingin trupulleiki at fylla blaðið, sigur ábyrgdarblaðstjórin, Tom Skaale. Tað verður heldur skilt frá, enn at tað manglar í, sigur hann.

Blaðið hevur verið í støðugari menning upp gjøgnum nítiárini. Og tað veksur alsamt í vavi. Í 1995 kom blaðið út við 8 til 12 síðum. Í dag er tað regluliga blaðið 16 til 24 síður, meðan tað fýra ferðir árliga liggja innlegg við serbløðum í. Hesi serbløðini eru vanliga fýra síður. Tey eru til dømis eitt Sjómansmissiónsblað, eitt Ytrimissiónsblað, eitt útisetablað, sum føroysk missiónsfólk í Danmark standa fyri og Shalom blaðið, sum Ísraelsmissiónin gevur út. Umframt er ein útgáva av Trúboðanum, sum nevnd verður Ársmøtisblaðið. Hetta er serútgáva av Trúboðanum, sum verður borin í hvørt hús beint fyri ársmøtini.

Trúboðin er ikki nakað stórt blað. Upplagið er 1600-1700 eintøk. Haldaragjaldið er kr. 270,- um árið.



*Blaðið verður sett upp í Nesvík og prentað á Dimmalætting* **(Mynd Edvard Joensen)**


ACROBAT/PDF SKEIÐ



Nýggj skeiðtænasta frá Farodane

Acrobat og PDF verða sera nógv umtalað í løtuni.
PDF verður góðkent á støðugt fleiri støðum sum skjalaviðgerðarformát.
Hetta ger seg galdandi innan skjalaviðgerð/skjalaflutning um internetið, eins væl og innan elektroniskar ”prentlutur” v. m.

Fyrsta skeiðið byrjar 12. apríl

TILMELDING frá heimasíðu okkara: kvasir.farodane.fo
- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail: kvasir@farodane.fo

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

SKOTARÓK 14
100 TÓRSHAVN
TLF. 211861 og 311414
FAX 317534

fd-3c-00